# Ein spurningur um rættvísi....

ADRIAN NOWKWITH

- Hevði Atlantic Airways havt møguleika til at givið eina betri tænastu í privatum hondum ella almennum??

Tað eru fyrimunir og vansar við báðum møguleikum, men tað er eingin ivi um, at privatiseringin má vera eitt mál, sum føroyingar sjálvir og myndugleikarnir gera av.

Í 2007 kom landsstýrið til ta niðurstøðu, at Atlantic Airways hevði verið rikið betur sum eitt privat partafelag, og eins og í nógvum øðrum londum í Vesturheiminum, varð farið undir privatisering. Tískil bleiv tað kunngjørt, at landið fór at selja helmingin av Atlantic Airways, og at hetta skuldi seljast í stigum, til privatar íleggjarar.

Landsstýrið gav út eitt prospekt vegna fyrsta stigið av søluni, sum svaraði til 33% av partabrøvunum. Prospektið lýsti treytirnar fyri partabrøvini, vinnuligu aktivitetirnar hjá fyritøkuni umframt fíggjarligu korini.

Eitt prospekt er eitt sera týdningarmikið juridiskt skjal, sum fungerar sum ein sáttmáli ímillum seljaran, í hesum førinum landsstýrið og áhugaðar keyparar. Skrivað stendur: »Tú skal kunna líta á, at upplýsingarnir í prospektinum eru eftirfarandi, tá tú skal taka støðu til, um íløgan skal gerast ella ikki.«.

Í 2007 var ein sera týdningarmikil og afturvendandi spurningur frá áhugaðum íleggjarunum, nevniliga um landsstýrið hevði ætlanir at nýta teir írrestandi 2/3 av partabrøvunum til at stýra fyritøkuni. Íleggjararnir vildu eisini vita, um ætlanin var at halda fram við søluni, til helmingurin av partabrøvunum vóru í privatum hondum.

Fyri at tryggja íleggjarunum omanfyristandandi punktir, segði táverðandi landsstýrismaðurin, at ivaleyst skuldi haldast fram við privatiseringini til 2/3 av partabrøvunum í Atlantic Airways, til tey vóru hjá privatum íleggjarum. Íleggjararnir trúðu fult og fast upp á hesi orð. Eg valdi at gera íløguna, tí at eg helt, at fyritøkan hevði eina sera sterka leiðslu, og at útlitini fyri vøkstur vóru góð, serliga eftir at hon var í privatum hondum og ikki stýrd av landinum.

Í seinastuni hevur man sæð nógv alment kjak um landsstýrismannin í vinnumálum, Jóhan Dahl og hansara ætlanir um at skifta ávísar nevndarlimir út við aðrar, sum hann sjálvur skuldi velja. Jóhan Dahl er ónøgdur við ávísar partar av fyritøkuni og væntar, at ein nýggj nevnd, sum hann sjálvur setur, skal rætta upp á tey mál.

Eg haldi, at leiðslan í Atlantic Airways hevur gjørt eitt sera stórt og gott arbeiði, í einum truplum tíðarskeiði, men tað hevur í roynd og veru ongan týdning. Spurningurin er, um landsstýrismaðurin skal umboða leiðsluna í fyritøkuni ella kanska eina nevnd, sum hann sjálvur hevur valt.

Tað, sum Jóhan Dahl hevur ætlanir um, er júst tað, sum Føroya Landsstýri lovaði ikki at gera, tá ið partabrøvini blivu seld privatum íleggjarum. Hetta er tó einans ein av fleiri feilum, ið landsstýrið hevur gjørt, sum mótsigur prospektið:

- Privatiseringin hevur ikki hildið fram, sum annars lovað, og landsstýrið í dag veit ikki eingang, um tey írrestandi partabrøvini skulu seljast
- Jóhan Dahl og onnur landsstýrisfólk hava havt nógvar almennar atfinningar um Atlantic Airways
- Landsstýrið hevur fyri stuttum flutt Vága Floghavn til ein myndugleika, ið hoyrir beinleiðis til landsstýrið og síðani givið loyvi til ein Duty-free handil, har alt yvirskotið fer frá flogfelagnum til landsstýrið – ikki júst tað, vit kunnu bólka undir »armslongdarprinsippið«.
- Nú ætlar Jóhan Dahl at yvirtaka alla leiðsluna av fyritøkuni við at seta hansara egnu nevnd.

Tað undrar neyvan nakran, at hendan gongdin hevur lækkað um virðið av partabrøvunum. Vildi nakar í grundini havt keypt, um ein visti, at landsstýrið hevði ætlanir at reka fyritøkan, sum tað hevur gjørt???

Í 2007 gav landsstýrið eitt lyfti, sum íleggjarar trúðu uppá. Um umstøðurnar eru broyttar so nógv, at landsstýrismaðurin í vinnumálum, Jóhan Dahl, ikki kann halda tey lyfti, so er minsta kravið, at hann tekur samband við teir íleggjarar, sum vístu landsstýrinum álitið við at keypa partabrøv. Hann skuldi bjóðað teimum at keypt partabrøvini aftur fyri upprunaliga kursin ella broyta partabrøvini til ikki at hava atkvøðurætt, fyri eina ávísa rentu. Síðani kann hann leiða fyritøkuna sum honum lystir.

FAKTA:
Adrian Noskwith er ein privatur íleggjari í Atlantic Airways

# Er føroyska flaggið hunddálkað?

KRISTIN RASMUSSEN

Vit føroyingar hava altíð roknað okkum ímillum norðanlond. At vit hava ein standard innan øll lívsins viðurskifti á jøvnum føti við okkara grannar. Men verður hugt at, hvussu støða okkarar er innan sjóvinnu, so er veruleikin ein heilt annar.

Sum smádrongur gekk eg so trúliga hvønn 25. apríl inn á Giljanes til flagdagshald. Lærdi um Merkið og at virða tað.

| År | 1999 | 2000 | 2001 | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Føroyar | 0.96 | 1,16 | 0,76 | 0,53 | 0,59 | 0,59 | 0,58 | 0,43 | 0,25 |
| Litava | 0,97 | 1,14 | 0,82 | 0,57 | 0,50 | 0,22 | 0,32 | 0,08 | 0,30 |
| Rusland | 1,65 | 1,37 | 1,04 | 0,67 | 0,38 | 0,32 | 0,18 | 0,22 | -0,17 |
| Kina | 0,02 | -0,18 | -0,55 | -0,61 | -0,67 | -1,00 | -1,23 | -1,60 | -1,75 |
| Isle of Man | 0,14 | -0,46 | -0,68 | -1,30 | -1,38 | -1,55 | -1,56 | -1,47 | -1,51 |
| Marchall Islands | -0,71 | -0,42 | -0,18 | -0,20 | -0,46 | -0,88 | -1,21 | -1,52 | -1,42 |
| Danmark | -0,89 | -0,80 | -1,08 | -0,75 | -0,75 | -0,95 | -1,31 | -1,44 | -1,49 |
| Noregi | -1,01 | -0,90 | -0,90 | -0,82 | -0,87 | -1,04 | -1,37 | -1,43 | -1,35 |

Lærdi at tað hevði fullan altjóða rætt á havinum. At eitt føroyskt skip var ein partur av Føroyum.

Niðanfyri er eitt yvirlit yvir, hvussu ávís lond á IMO listanum Paris MoU(sonevnda svartalista) klára seg við Port State Control. Tøl yvir 1 siga at landið er á svartalista, tøl ímillum 0 og 1 siga, at tað er á gráa lista. Er talið undir 0, er landið hvítlista.

Vanliga samanbera vit okkum við Danmark ella Noregi, men á yvirlitinum minna vit mest um ein fyrrverandi sovjetstat. Rusland og Kina eru komin upp á hvíta lista. Kina er nú millum heimsins bestu fløgg. Isle of Man og Marshall Islands eru lond, vit skulu kappast við, um vit ætla at fáa skip undir føroyskt flagg. Tey eru ímillum heimsins bestu fløgg í skipaskrásetingarhøpi.

Nú eru tølini bert tøk fram til 2007. Men við skipum eftirhildnum bæði her og har í løtuni er neyvan vón um bata.

Men hvussu er støðan í dag. Vit taka útlendingar umborð á føroysk skip. Teir doyggja, tí vit ikki hava syrgt fyri at trygdin umborð er í lagi. Á okkara minningardegi fyri teim sjólatnu verða teir ikki tiknir upp á tungu. Vit taka útlendingar umborð á føroysk skip. Vilja ikki góðtaka, at teir eru manning. Geva teimum ikki mat, ljós og hita.

Sum støðan er í dag kann ein og hvør skráseta eitt skip undir føroyska flagginum. Lata tað liggja og rekast sum ein umhvørvisbumba í onkrari útlendskari havn. Eingin føroyskur myndugleiki tekur sær ábyrgdina.

Sum smádrongur gekk eg so trúliga hvønn 25. apríl inn á Giljanes til flagdagshald. Lærdi um Merkið og at virða tað. Lærdi at tað hevði fullan altjóða rætt á havinum. At eitt føroyskt skip var ein partur av Føroyum. Er tað ikki galdandi longur?

# P/F Sandoyartunnilin – eitt innantómt hylki!

PÁLL Á REYNATÚGVU
borgarstjóri á Sandi



**Helst ein nakað dapur yvirskrift fyri okkum, sum her búgva, men veruleikin er, at um løgtingsmál nr 146/2008 vinnur frama á Tingi, so verður ikki bara heimildin at gera Sandoyartunnilin útsett, nei hon verður snøgt sagt tikin burtur, og harvið eisini møguleikin at gera lívæðrina hjá Sandoynni, komandi Sandoyartunnilin.**

Tilgongdin til at gera Sandoyartunnilin kann í stuttum lýsast soleiðis:

Fyrireikandi kanningar. Kostnaður u.l. 10. mió.kr (tær flestu eru gjørdar)

Samtykt heimildarlóg frá 12.12.07. (verður nú sambært løgtingsmáli nr.146 avtikin.)

Projektering av tunnlinum. Kostnaður 20-25 mió. kr. (arbeiðið er ikki byrjað)

Stovnan av P/F Sandoyartunnilin (verður gjørt við 2 mió.kr. sambært løgtingsmáli 146)

Fíggjarlig játtan antin beinleiðis á fíggjarlóg, ella við lántøku (ongin loysn funnin)

Bygging av tunnlinum (skuldi vera 1/11-2009, men heimildin verður nú burturtikin)

Sambært teirri gongd, sum hevur verið í málinum um Sandoyartunnilin síðani hann varð samtyktur, so er lítið sum bendir á nakað fyri Sandoyingar, serliga kveikjandi í málinum. Hinvegin sær út til at skiftandi ábyrgdarhavarar, við ivasomum gongulagi hava roynt at skáksiglt undan ábyrgdini, sum liggur í samtyktu løgtingslógini frá 12.12.07.

Tað sum kortini loypir í eyga, er at verandi samgonga, her umboða av Anniku Olsen úr Fólkaflokkinum, nú hevur lagt løgtingsmál fram, sum avhøvdar samtyktu lógina um Sandoyartunnilin.

Uttan hímpr. Ongin av okkum, sum her búgva, verður eftirspurdur. Hvørki kommunur, vinnulív ella borgarar. Ongin hoyring. Ongin Kunning. Vónin sløkt frá degi til dags.

Vit hoyra næstan teskini: Hyssj! Ikki siga tað, men vita avtaka Sandoyartunnilin, og so fá sum gjørligt skulu vita av tí. Og tað tykist sum um fjølmiðlarnir spæla við. Enn havi eg ikki hoyrt ella sæð, nakran miðil viðgjørt spurningin um avtøkuna av lógini um Sandoyartunnilin. Og tað stendur í rættiliga stórari andsøgn við miðlameldurin, sum stóðst av samtyktu lógini.

Sokallaðu marknaðarkreftirnar hava eftir tveimum árum knúst búskaparstøðu heimsins, og júst tað átti at verið áminningin til okkum um, at samhaldsfasta leiðin, sum tryggjar øllum borgarum javnbjóðis fortreytir fyri at mennast í samfelagnum, og at menna samfelagið, er leiðin at ganga.

Løgtingsmál nr. 146/2008 heilmiðlar at stovna P/F Sandoyartunnilin, men er í veruleikanum eitt innantómt hylki uttan fígging og heimildir. Finnbogi Ísakson, sáli, hevði uttan iva nevnt ætlanina, eina snilda roynd at lumpa tey sum eru góðtrúgvin og ikki vita betur.

Eftir sita vit í Sandoynni, sum sligin á nevið. Ongin nýtist at siga okkum hvønn týdning vegasamband hevur í dagsins samfelag. Vit kunnu bert hyggja í ein norðan ella vestan. Verst er kortini kenslan av at vera uttanfyri. At vera uttanfyri møguleikarnar, marknaðin og uttanfyri brøðralagið hjá restini av tjóðin Føoyar!

Vónin býr í, at enn hevur politiska skipanin møguleikan, ikki at sløkkja kontaktina.

Lesið fleiri viðmerkingar á síðu 28